gult cyan magenta svart





gult cyan magenta svart

## DAGSINS MEINING

# Samvinna við Bretland

Í næstum fer Føroya løgmaður á almenna vitjan í Bretlandi. Hetta er fyrstu ferð, at ein løgmaður fer á almenna vitjan í Stórabretlandi. Innbjóðingin kom í kjalarvørrinum á undirskriving av marknaavtaluni millum Føroyar og Bretland. Ætlanin er at løgmaður skal vitja bæði í Skotlandi og í Onglandi. Áhugaverd verður vitjanin í Skotlandi, tá hugsað verður um ríkisrættarligu støðuna hjá bæði føroyingum og skotum. Eins og føroyingar hava havt heimastýri og stríðast fyri størri sjálvstørri, so hava skotar leingi stríðst fyri hesum sama, tó at teir eins og føroyingar eisini eru ymiskir á máli. Spurningurin er so, hvussu løgmaður fer at kunna skotskar politikarar um gongdina í Føroyum, og hvønn íblástur skotar kunnu geva løgmanni.

Eitt høvuðsendamálið við ferðini er annars at knýta tættari bond millum Stórabretland og Føroyar. Hvussu kunnu vit menna og útbyggja verandi samvinnu, og hvussu kunnu vit bróta heilt upp úr nýggjum! Tað góða í hesum samstarvi er, at hóast stórur munur á londum og fólki, so hava báðir partar brúk fyri hvørjum øðrum. Bretlandi tørvar okkara fisk og við eini komandi oljuvinnu eru vit bráddliga áhugaverd fyri bretskan olju-ídnað. Føroyingum tørvar so sanniliga eisini bretska tøkni og vørur og ikki minst hava vit brúk fyri tí stóra marknaðinum, sum er í Bretlandi. Og fara vit víðari eisini sum brúgv til evropeiska meginlandið.

Føroyingar hava verið í so vanabundnir við at lata nærum alt samskifti og samhandil ganga gjøgnum traditionellu kanalirnar, Danmark, Noreg, Svøríki og Ísland. Hetta hevur so havt við sær dýrkandi millumlið. Við at fara beinleiðis til framleiðarar í Bretlandi eiga vit at sleppa undan dýrkandi millumliðunum. Tí skal tað vera vón okkara, at eitt av úrslitunum hjá løgmanni og føroyskum vinnulívsfólki undir vitjanini í Bretlandi er, at vit fáa ein beinleiðis samhandil uttan um útlendskar millummenn.

Løgmaður skal hitta bretskar ráðharrar, og vónandi fer tað at gagna samhandlinum og forstáilsinum fyri grannanum fyri norðan. Tað er so ikki bert á tí vinnuliga økinum, at vit eiga at síggja samstarvsmøguleikar. Eisini á mentanarøkinum eigur at verða møguleiki fyri øktari samvinnu. Tí vil ein náttúrlig uppfylging av slíkari vitjan vera at menna tey mentanarligu bondini. Vónandi fer løgmaður at koma heimaftur við onkrum íblástri á hesum øki eisini, so talan ikki bara er um handil og vinnu. Menniskjuni og tað hesi skapa av andaligum og mentanarligum virðum er eins týdningarmikið og alt annað.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Minningarorð um Hjørdis Klein

Røddin er tagnað og stríðið er vunnið. Eftir langt og tógvið stríð hevur Hjørdis lagt árarnar inn. Nú orkaði hon ikki meira. Hon hevði á orði, at hon skilti ikki, at Várharra ikki kundi taka seg, tí hon var so móð, hon orkaði ikki at anda. Eg helt við hana, at tað mundi vera tí, hann ætlaði hana at vera her eitt sindur enn. Hetta prát fall so lætt og náturliga fyri henni. Hetta var ikki "tabu", men endinin av lívinum - endin av lívsins stríði. Sjálv kendi eg tað ikki so lætt, sum hon at tosa um hetta. Kanska var tað tí, at hon hevði livað 30 ár longri enn eg og var mett av døgum.

Hjørdis og eg komu at kennast fyri 20 árum síðani í samband við, at vit fóru at seta á stovn Norðoyða Heimavirki.Í tí lá eitt stórt fyrireikingararbeiði, ið lá okkum á og sum vit baksaðust eldhugaðar fyri. Ikki var tað heldur, at tað altíð gekk við streyminum.Tá var Hjørdis ein dyggur stuðul. Hon tordi at føra seg fram og dugdi at vísa á, at hon hevði grein í sínum málum.

Hon hevði lívsroyndir, sum var henni góð ein barlast at berjast fyri hesi søk, sum vit so fegnar vildu trúgva uppá.Alt arbeiðið varð drivið í einum "filantropiskum" anda. Annars bar ikki til.

Hon gavst ikki fyrr enn vit náddu á mál.

Hjørdis var við so leingi heilsan loyvdi henni tað. Hóast hon ikki orkaði at koma á gátt, fylgdi hon eldhugað við, hvat fyrifórst.

Tað var áhugavert at hoyra Hjørdis siga frá lívssøgu síni. Hvussu hon hevði stríðst sítt stríð, fyri at fáa tað at bera til. Skilligt var, at tað var ikki altíð lætt. Men við at trúgva uppá og siga við seg sjálva, tað skal bera til, so bar tað til við góðari hjálp og góðum vilja.

Hennara stríð er komið at enda og Hjørdis hevur fingið frið.

Friður verið við minninum.

**Elisa**

**Til minnis um elskaðu móðir okkara**
## Annu Sofíu Jacobsen
## d. 17. januar 2001

Vit takka tær mamma –
fyri alt tú lærdi okkum gjøgnum lívið
Gudsótta og kærleika
Gleði og friðsemi
Bønirnar fyri okkum øllum
Børnini – tey vóru hjarta tínum nærmast
tú elskaði tey øll
tey veikastu – tey vardi tú.
Serligi hugur tín var til allan vøkstur
urtir og trø
Vakrar blómur
tú gleddist tá várið nærkaðist
at fara út at seta niður í moldina
blómufræ, urtir og leykir
Alt ið hendur tínar numu við
treivst, vaks – og bleiv vakurt
hetta frøddi hjarta títt
tú dugdi so væl at gleðast í tí sum var
og ikki at tráa eftir tí sum ikki var
Sárt var at missa teg – tú vart so nógv í lívi okkara.
Sárur er saknurin.

**Døturnar**

# Radio og telefonóskil í Klaksvík

Síðani LINDIN kom hevur verið rættuligt radioóskil í Klaksvík — alt gott um Lindina og hinar radiostøðirnar við, men her er ein trupulleliki, sum má rættast sum skjótast.

Í fleiri heimum hoyrist ÚF, Rás 2 og Lindin samstundis á at kalla somu kanal, tað er ikki óvanligt at hoyra Elis (ÚF) og Jenis (Lindin) og Sonna (Rás 2) samstundis, og tað sigur seg sjálvt, at tá er totalur forvirringur, og einasta, sum er at gera, er at sløkkja, tíverri.

Tí verður heitt á tykkum sum varða av, at fáa hetta í rættlag sum skjótast.

Tosaði ídag við skiparan á Dúgvuni yvir fartelefonina fyri at gera avtalu um bjargingar og brunavenjing umborð einaferð til várs, ein venjing fyri manning og sløkkiliðsfólk.



Hevði ikki meira enn koyrt telefonina í lumman, nú ringir aftur og er ein sløkkiliðsmaður í telefonini, sum spyr meg, ”Tú,- nær var tað at venjingin skuldi vera umborð á Dúgvuni”, Jamen sigi eg, hvar veit tú tað frá. Jú eg hoyrdi tykkum báðar, Skiparan og teg á Rás 2. Eg tendraði tólið ákkurát ov seint til at fáa alt við.

Her er okkurt spinnandi galið, man hetta vera dagligt ella hvat???

Neyðsendarin á sløkkiliðsstøðini eisini órógvaður!

Á sløkkiliðsstøðini stendur ein neyðsendari/móttakari, - sum gevur beinleiðis boð frá 112 um nevnda neyðsendara, til okkara radiopippara/móttakarar sum hvør sløkkiliðsmaður hevur í lumm-anum, hetta fyri at sløkkiliðið skal veraført fyri at veita skjóta og góða hjálp til øll, sum eru í neyð, tað veri seg í smband við eldsbruna, ferðsluvanlukku ella annað.

Tað er meira enn einaferð komið fyri, at neyðsendari okkara tekur ímóti og sendir tónleik frá ÙF í upptil 20 minuttir ísenn, fyri síðani at hvørva aftur.

Eg spyrji, hvør hevur ábyrgdina, um neyðsynjarboð ikki koma okkum í hendi fyrrenn óv seint vegna nevnda trupulleika, tað kann í ringasta føri kosta mannalív. Og tað er sera álvarsamt.

Málið er kannað, og eingin feilur varð funnin — men framvegis er tónleikur at hoyra í løtum frá radiosendaranum, nú sjáldan og styttri.

Men vælsignaðir avvarðandi, radioeftirlitið - televerkið, fái skil uppá óskilið.

**Kári Kjelnæs**
**Sløkkiliðsleiðari**
**Klaksvík**


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 348mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.